# Teitur verður ferðaleiðari




**Fimm ferðandi sleppa í summar at ferðast við Teiti og einum sjónvarpsliði kring Danmark í fimm dagar. Teitur avger fullkomiliga, hvar leiðin gongur, og tá tey ferðandi rinda fyri ferðina, vita tey ikki, hvar hon gongur**

FERÐING
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í hesum døgum er danska sjónvarpsstøðin DR2 í ferð við upptøkurnar til eina øðrvísi ferðasending. Undirheitinum DR2 Tours, fáa fimm ferðandi møguleikan fyri at fara á eina ferð í fimm dagar kring Danmark, undir ferðaleiðslu av kendum og karismatiskum dønum. Ein av ferðaleiðarunum verður okkara egni Teitur.

Tá tú keypir ferðina, veitst tú einki um, hvar ferðin gongur. Tað er ferðaleiðarin, ið avger allan túrin: Hvar tey skulu fara, hvar tey skulu búgva og hvønn tey skulu hitta. Teitur er tann síðsti av ferðaleiðarunum, og hann fer at ferðast við fimm ferðafólkum og einum sjónvarpsliði kring Danmark í døgunum. 4.-9. juli. Hvar Teitur fer við teimum er ikki gott at gita, men tað verður óivað áhugavert. Tey ferðast kring Danmark í einum lítlum trongum bussi í danska summarhitanum, so talan verður um ein túr, har fólk veruliga kemur hvør øðrum við. Umframt Teitur vera m.o. Souvenirs, ið vitjaðu í Føroyum í fjør millum ferðaleiðarirnar. Jens Folmer Jepsen, Farshad Kholghi og Nikolaj Kirk hava higartil verið ferðaleiðarar, meðan Souvenirs taka ferðaleiðsluna í aðru viku.

Ferðirnar verða kliptar saman til fimm tema leygardagar á DR2, ið verða sendir í juli.

Á heimasíðuni hjá sjónvarpsrásini verður sagt at fyri at melda seg til ferðina, skalt tú skriva eitt teldu- til psu@dr.dk, har tú skrivar navn, aldur, bústað og tlf., og hvønn ferðaleiðara tú ynskir tær, eitt sindur um teg sjálvan, hví tú vilt við og viðhefta eina mynd av tær. Ferðirnar kosta 3.995 kr.

Vit flúgva til Aberdeen
2 ferðir um vikuna

Aberdeen ella Glasgow
Nýtt

Íbúðir - The Spires Aberdeen
Hósdag - sunnudag

1 rúms íbúð 2 fólk í 3 nætur, fyri hvønn........... 3.832,-
2 rúms íbúð 4 fólk í 3 nætur, fyri hvønn........... 3.287,-
Íroknað prísin er flogferð, gisting, continental morgunmatur og øll avgjøld.

Íbúðir - The Spires Glasgow
Hósdag - sunnudag

1 rúms íbúð 2 fólk í 3 nætur, fyri hvønn........... 4.182,-
2 rúms íbúð 4 fólk í 3 nætur, fyri hvønn........... 3.637,-
3 rúms íbúð 6 fólk í 3 nætur, fyri hvønn........... 3.456,-
Íroknað prísin er flogferð, gisting, Continental morgunmatur, øll avgjøld og tokferð Aberdeen - Glasgow og aftur.

Vit hava eisini nógv onnur góð tilboð til Skotlands.
Ring 341010 og frætt nærri.

www.sansir.fo
ATLANTIC AIRWAYS
Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum
www.atlantic.fo




## Supply Base Operation

In an exciting period for the Faroe Islands, Faroe Ship has been contracted by the first offshore oil exploration licence holders to provide logistics and supply chain management services.

Faroe Ship have had a presence in Runavik for more than 30 years and are proud to involved from the outset in meeting the challenges of this new development for the islands. The port authority in Runavik have built a new harbour to meet increases in offshore activity.

**Amongst our contracted responsibilities are:**
*Loading and unloading of supply vessels, Terminal work, Material co-ordination, Cargo handling – reception and distribution, Administration of indoor and outdoor storage areas with inventory control, Provision of various equipment and merchandise.*

REPROZ

A new era for the Faroe Islands.

SKIPAFELAGIÐ